# Samband ynskist



*Limaskapur í ES hevur í nógv ár verið eitt aðalmál fyri Kaj Leo Johannesen og Sambandsflokkin*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Sambandsflokkurin er sambandsflokkur í orðsins sonnu merking. Ikki nóg mikið við samband við Danmark. Hann vil eisini hava samband við ES. Vit hava havt samrøðu við formannin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen um, hvat ið ein liberalur flokkur sum hansara vil við øllum hesum sambondunum.**

VALFEBUR
*Jógvan Mørkøre*
*Samfelagsfrøðingur*

*Spyrjari: Sambandið - ella ríkisfelagsskapurin við Danmark – er frammalaga í øllum politikki hjá Sambandsflokkinum. Í stevnuskránni hjá flokkinum verður dentur lagdur á, at av tí at landið er lítið, fólkið fáment og tilfeingið úr sjónum avmarkað, so er neyðugt at hava tilknýti til annað land.*

- Ja, og har hava vit so verið saman við Danmark í øldir og notið gott av tí. Fyri okkum er sambandið og samstarvið við Danmark ein av súlunum undir allari vælferð í Føroyum. So har, aðrir flokkar eru altráir eftir at koma burtur úr ríkisfelagsskapinum, eru vit fyri at menna hetta samstarv og fáa gagn burtur úr teimum møguleikum, hann gevur okkum. Til dømis at geva okkum frægari sømdir í okkara viðurskiftum við ES. Her vil eg undirstrika, at ríkisfelagsskapurin er ikki eitt endamál í sjálvum sær, men heldur eitt amboð. Eitt øðiliga hent amboð at tryggja vælferð her á landi.

*Spyrjari: Tit gera annars nógv burtur úr teimum bondum, ið knýta Føroyar og Danmark saman. Og tá ið tað kemur til mentan og andslív fær danskt mál og donsk mentan eina serliga støðu og rúmd. Merkir tað, at tit síggja føroyingar ikki bara sum føroyingar, men eisini sum eitt slag av danskarum. At tað er neyðugt at framleiða smáar danskarar fyri at kunna vera við í hesum ríkisfelagsskapi?*

- Nei. Føroyingar eru ein tjóð fyri seg. Danir ein tjóð fyri seg. Men danskt mál, donsk mentan og danskt andslív hevur verið ein so mikið stórur partur av okkara mentunarligu barlast, at tað ikki er nakað, vit tveita fyri borð uttan víðari. Tað at læra danskt mál væl og virðiliga, sum vit siga, hevur eisini víst seg at vera hent í norðurlendskum samstarvi. Har hava vit eina serstøðu við at duga tvey norðurlendsk mál. Men sjálvandi, vit vita væl, at hetta broytist. Enskt hevur hug at troðka norðurlendsk mál av í norðurlendska samstarvinum. Eg vil siga tað so: Sambandsflokkurin sær tað ikki sum sína uppgávu at varðveita danskt mál og mentan í Føroyum til æviga tíð. Tað er ikki tað, sum liggur í tí, vit siga, men tað, at vit eiga at virðismeta týdningin, tað hevur havt og framvegis hevur fyri okkum at duga danskt mál og eiga lut í einari ríkari mentan, sum bæði er uttan fyri okkum, men samstundis eisini ein partur av okkum.

*Spyrjari: Pengarnir úr Danmark, blokkurin, hava mangan elvt til politiskan tvídrátt millum føroysku flokkarnar. Ikki minst meðan Fullveldissamgongan ráddi fyri borgum. Fyri flestu føroyingar standa tit sum fremsti verji – ella største forðing – tá ið talan hevur verið um at minka um blokkin ella taka hann heilt burtur.*

- Ja, eg veit. Men eg haldi ikki, at hatta er ein heilt rættvís mynd. Tú sært t.d. organstaðni í okkara stevnuskrá, at vit siga, at heildarveitingin úr Danmark ikki má minkast.

*Spyrjari: Nei, tað er rætt. Men tú mást viðganga, at signalini, tit senda, kunnu ørkymla tey, ið royna at fáa greiðu á, hvar flokkurin stendur í hesum spurningi. Tá ið tú fert inn á heimasíðuna hjá tykkum, so er tað fyrsta, tú fært at vita, at blokkniðurskurðurin hevur kostað landskassanum góðar tvær milliardir krónur. Eftir hasum at døma var talan um eina deyðssynd, tá ið Fullveldissamgongan minkaði blokkin. Landsstýrismaðurin hjá tykkum í fíggjarmálum, ið sat tað mesta av hesum valskeiðnum, Bárður Nielsen mælti jú eisini til at fáa fastfrystingina burtur, so blokkurin kundi hækka aftur. Og nú hava tit fingið nýggjan mann í handa sessin, Magni Laksáfoss, ið hevur mælt til at umhugsa at minka blokkin sum ein máta at køla yvirupphitaða búskapin. So tað er væl ikki løgið, at fólk verða ørkymlað og spyrja, hvar Sam-*

| Løgtingsval | | | | Veljarakanningar | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 20.01.2004 | Juni 2006 | Des 2006 | Des 2006 | Jan 2007 | Mai 2007 | Aug 2007 |
| 23,7 | 24,1 | 26,8 | 23,6 | 22,1 | 19,6 | 24,6 |
| | Fynd | Gallup | Fynd | Gallup | Gallup | Gallup |

*Undirtøka Sambandsfloksins í veljarakanningum (%).*